Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 31. juli 2022
Mál nr.: 21/08685
Málsviðgjørt: SJ/OYS

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. mai 2019 um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík, verða gjørdar hesar broytingar:
"Løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík"	**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis: **"Løgtingslóg um studningslán og stuðul til at byggja húsarhaldskúla í Klaksvík"**
§ 1. Heimilað verður landsstýrismanninum at veita stuðul til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík. Stuðulin úr landskassanum er, í mesta lagi, 21 mió. kr.	**2.** Í § 1, stk. 1, 2. pkt. verður "21 mió. kr." broytt til: "37,3 mió. kr."
	3. Aftan á § 1 verður sett: "**§ 1 a.** Heimilað verður landsstýrismanninum at veita stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, í mesta lagi 5 mió. kr. Treytin fyri at stuðulin verður latin er, at sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya fíggjar 50% av

	útreiðslunum til keyp av innbúgvi og útbúnaði. *Stk. 2.* Umframt treytina í stk. 1 kann landsstýrismaðurin áseta aðrar treytir fyri at veita stuðulin, so sum útgjald av stuðli, krøv til at keypa innbúgvið, mannagongdir í samband við innheinting av tilboði oa. *Stk. 3*. Ásetingarnar í §§ 2 og 3 eru ikki galdandi fyri stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði, sbrt. stk. 1.”